ítróttur

Nr. 238 • mikudagur • 11. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kasakstan bjóðar Føroyum av

**Uppleggið, sum FSF skal taka støðu til, er, at tveir landsdystir verða spældir í Føroyum síðst í apríl næsta ár. Tilboðið er ikki treytað av, at Føroyar seinni skulu spæla í Kasakstan**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Møguleiki røkist nú fyri, at Kasakstan verður eitt av næstu mótstøðuliðunum hjá føroyska fótbóltslandsliðnum*

Í hesum døgum tyggir Fótbóltssambandið upp á eitt tilboð um at tveir landsdystir verða spældir í Føroyum síðst í apríl komandi ár. Tað er Kasakstan, sum hevur bjóðað sær at koma higar at spæla tveir dystir. Um tilboðið gerst til veruleika, so er møguleiki fyri, at Føroyar og Kasakstan fara at spæla landsdystir í Føroyum flaggdagin 25. apríl, sum er fríggjadag, og sunnudagin 27. apríl.

– Vit hava akkurát fingið tilboðið. Venjararnir og leiðslan í FSF og landsliðsnevndin eru kunnað um tilboðið, og allir partar halda, at talan er um áhugaverdan fyrispurning. Vit fara seinni í hesi vikuni at geva fótbóltssambandinum í Kasakstan eitt positivt svar. So fáa vit at síggja, hvat úrslitið verður. Treytirnar, sum teir hava givið til kennar, at teir eru sinnaðir at koma henda vegin eftir, eru avgjørt at liva við hjá okkum, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.

Tilboðið hjá Kasakstan er, at teir sjálvir rinda ferðina til og úr Føroyum, og at føroyingarnir rinda fyri uppihaldið hjá teimum her. Tað er upp á tal, at teir skulu koma henda vegin hósdagin 24. apríl, og at teir fara av aftur landinum sunnudagin 27. apríl, ella beinanvegin eftir at seinni dysturin er spældur.

Sambandið millum FSF og Kasakstan spurdist í Manchester í síðstu viku. UEFA skipaði fyri stevnu um samskifti. Ivan Eginsson, sum seinastu ferðirnar hevur havt ábyrgdina av tíðindafundunum í sambandi við landsdystirnar í Føroyum, var á fundinum. Hann hitti umboð fyri kasanska fótbóltssambandið. Teir vístu beinanvegin áhuga at koma henda vegin. Vikuskiftið 25.–27. apríl er landsliðsvikuskifti. Tí varð tann møguleikin beinanvegin nevndur, og mánadagin kom almennur fyrispurningur til FSF frá kasanska fótbóltssambandinum.

## UEFA limur

Kasakstan er ein av gomlu statunum í Sovjetsamveldinum. Víddin er rættuliga stór, tí talan er um næststørsta av gomlu Sovjet londunum. Vestasti parturin av landinum liggur ímóti Russlandi og suður ímóti Kaspiska havinum. Landið fer um markið millum Europa og Asia. Millum grannatjóðirnar eru Turkmenistan, Usbekistan, Kirgisia, Kina og Mongolia.

Ikki kann sigast annað, enn landið ljóðar heilt fremmand, sum FSF er komið í holtur við. Størsti parturin av landinum er í Asia, men tólv prosent av landavíddini er í Europa. Íbúgvaratalið liggur um fimtan milliónir. Helmingurin er kasahar og hin helmingurin nýtir russiska málið. Nøkur hundrað túsund av teimum eru etniskir týskarar.

Eftir at Sovjetsamveldið datt sundur, fekk Kasakstan fullveldi í 1992. Í fótbóltshøpi høvdu teir eitt lið í bestu sovjetisku deildini. Í 1994 fingu teir limaskap í FIFA og í AFS (Asiatian Football Confederation). Í 2001 tóku teir seg burturúr AFS. Teir søku í staðin um limaskap í UEFA, og í apríl í ár fingu teir europeiskan limaskap, tá ið UEFA hevði fund í Stokhólmi.

## Ríkt land á Europa ferð

Kasakstan er ikki serliga kent land á okkara leiðum, men talan er um eitt land, sum er rættuliga væl fyri. Orsøkin er oljan, sum tey seinastu árini hevur givið landinum ógvuliga stórar inntøkur.

Forsetin í fótbóltssambandinum eitur Rakhat Aliev. Hann er versonur til forsetan, sum hevur sitið øll árini, síðani landið fekk fullveldi. Hesin eitur Nursultan Nasarbaev, og hann sigst vera ein tann ríkasti maðurin í øllum Asia. Forsetin í fótbóltssambandinum starvast dagliga sum sendimaður hjá Kasakstan í Eysturríki.

Teir settu nýggjan landsliðsvenjara fyri kortum. Hann eitur Leonid Pahamov. Hann er ein av royndastu fótbóltsmonnunum í Russlandi. Hann hevur í mong ár verið venjari hjá russiskum unglinga landsliðum.

Síðani fullveldistøkuna í 1994 hevur Kasakstan spælt 50 landsdystir. Størsti sigurin hjá teimum var í undankappingini til HM í 1998. Tá vunnu teir ikki minni enn 7–0 á útivølli ímóti Pakistan. Størsta tapið var í somu kapping. Tá taptu teir á útivølli 4–0 ímóti Sameindu Emirríkjunum.

Higartil hevur Kasakstan bara spælt tríggjar ferðir ímóti UEFA limalondum. 14. november í 2001 megnaðu teir málleysan javnleik í Tallinn í Estlandi. 17. apríl í ár taptu teir 2–1 í Riga í Letlandi, og 7. juli í ár var aftur javnleikur ímóti Estlandi. Hesin dysturin var á heimavøllinum í Almaty.

Flestu spælararnir á landsliðnum eru dagliga í heimligu kappingini. Einir fimm ella seks spæla í bestu og næstbestu russisku deildunum. Í summar spældu feløg úr Kasakstan fyrstu ferð við í Europa Cup. Einki av teimum trimum feløgunum megnaði at spæla seg víðari í næsta umfarið.

– Tá ið talan er um vinardystir, verður ofta lagt upp til, at liðið, sum vitjar, skal fáa vitjan aftur. Í hesum førinum er einki sovorðið inni í myndini. Kasakstan er áhugað í at koma henda vegin, og teir tosa einki um, at vit skulu vitja teir aftur, sigur Ísak Mikladal.

Í føroyska fótbólts álmanakkanum er eitt punkt á dagsskránni sunnudagin 27. apríl. Tá er dysturin ásettur at vera í Íslandi millum HB og íslendska meistaraliðið.

– Enn er alt so nýtt, at vit ikki hava havt stundir at gera nakað við tann spurningin. Men verður møguleikin um vitjan úr Kasakstan veruleiki, so ivist eg onga løtu í, at vit eisini fara at loysa spurningin, hvussu tað verður við HB og landsliðnum, sigur Ísak Mikladal.



# Evald fyrstur um Sundið

**Meðan summi runnu undir Vestmannasund, nýttu fýra svimjarar høvið til at kappsvimja millum Vestmanna og Oyrargjógv**

SVIMJING
*tíðindaskriv*



*Vátdraktirnar, sum nýttar vórðu, vóru góð verja í kalda sjónum, og var tað so ikki kuldin, ið gav svimjarunum trupulleikar*

Sum ein partur av tiltakinum »Opið undir Sundi« varð eisini skipað fyri svimjing um Vestmannasund. Tá byrjað var at tosa um at svimja yvirum, vóru fleiri, ið ætlaðu sær við, men m.a. kuldi og ein svimjikapping í Klaksvík gjørdu, at svimjararnir blivu bara fýra.

Áðrenn kappingina var eitt sindur tosað um hitan í sjónum, um tað ikki var ov kalt, nú á hávetri, men hetta vísti seg ikki at vera nakar trupulleiki, svimjararnir søgdu seg ikki merkja til kuldan, kanska heldur hinvegin.

Tá svomið verður um firðir og sund, er alneyðugt at hava eina drakt ið bæði er løtt at svimja í, og sum eisini heldur hitanum. Allir svimjararnir høvdu draktir av tí slagnum, sum verða brúktar til triathlonsvimjingar á sjónum, og hóast hesar bara eru 3 mm tjúkkar, so bilaði kuldin sum sagt ikki.

Hvør svimjari skuldi sjálvur skaffa sær bát, við minst skipara og lívbjargara umborð, hetta fyri at trygdin skuldi vera í lagi.

Vestmannabátar fylgdu við svimjarunum, og vóru tað staðkendir og streymkendir menn, ið førdu bátarnar, nakað ið er eins týdningarmikið og tað at svimjarin er væl fyri.

Byrjað var kl 11:30 við Norðurgjógv, nakað sunnan fyri Vestmanna. Kyrrindir vóru, og tí bar til at leggja beint á sundið, og ikki kann sigast annað enn at hetta hepnaðist sera væl, tí allir svimjararnir komu yvirum, tveir teir fyrstu svumu beint á Oyrargjógv, meðan hinir báðir komu á land eitt sindur syðri á, og runnu teinin til ferjuleguna, har málið var.

Úrslitið av svimjingini um sundið var hetta:

| Nr. | Svimjari | Bátur/skipari | Lívbjargari | Tíð |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Evald Rasmussen | Barbara/Bjarki Skúvadal | Rói Eysturdal | 0:21:26 |
| 2. | Sigurd Lamhauge | Urðardrangur/Jóhann á Rógvi | Jákup Jacobsen | 0:22:23 |
| 3. | Erlendur Simonsen | Silja/Jákup A Lamhauge | Palli Lamhauge | 0:27:39 |
| 4. | Niclas Olsen | Símin Olsen | Elsa Olsen | 0:27:59 |

# Søguligur dagur hjá Drátti

**Tær sleppa ikki heilt undan at sigla, men fyri fyrstu ferð kunnu kvinnurnar hjá Drátti koyra av oynni, tá tær fara til útidyst**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyri fyrstu ferð sleppa skulu kvinnurnar hjá Mjølnir royna, hvussu tað er at fara av oynni, uttan at skula sigla um Vestmannasund, tá tær mikudagin skulu spæla dyst í meistaradeildini.

Heilt undan sigling sleppa tær tó ikki, tí enn er undirsjóvartunnilin so ikki komin undir Leirvíksfjørð, men hvør veit, kanska verður landfast av Giljanesi til KÍ-høllina um nøkur ár.

Umframt at dysturin soleiðis er eitt sindur søguligur fyri Drátt, so hevur hann samstundis eisini stóran týdning fyri, hvørt liðið fer at megna at leggja seg út í heiðursmerkjastríðið í ár.

Undan dystinum eru hesi bæði liðini ájøvn á triðja plássinum við 10 stigum, men írestandi dystarskráin fyri grundspælið vísur, at Mjølnir hevur teir á pappírinum lættari dystirnar, og tí er einki at ivast í, at Dráttur má hava stig heim aftur við sær, um tær skulu hava fatur á triðja plássinum í grundspælinum.

Dysturin verður leiktur í KÍ-høllini kl. 19.30.

# John Arni og Eyðun í finaluni

**Kappingin um at gerast sterkasti talvútisetin stendur í ár millum John Arna Nilssen og Eyðun Nolsøe**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Árliga kappingin um at finna besta talvútiseta á flatlondum, er nú komin langt áleiðis. Bert tveir telvarar kunna nú ogna sær heitið, og eru teir ikki óvæntað ratingfavorittarnir John Arni Nilssen og Eyðun Nolsøe. Bert Heini Olsen manglar av topptelvararnum í felagnum, so talan er tískil um sterka kapping.

Kappingin varð skipað soleiðis, at fimm telvarum vóru í tveimum bólkar, har tveir teir fremstu í bólkunum báðum vunnu seg í hálvfinalur. Hesir vórðu John Arni og Carl Eli N. Samuelsen í tí eina bólkinum, og Eyðun og Terji Petersen (sum vann í fjør) í øðrum bólkinum. Teir sum ikki komu víðari vórðu Heini Danielsen, Dannie Nielsen og Martin N. Simonsen ið leiktu í bólkinun, sum Eyðun vann, og Finn Nøhr, Rógvi Olsen og Suni Egholm í seinna bólkinum.

Bæði John Arni og Eyðun vunnu tryggar sigrar í hálvfinalunum móti ávíkavist Terja og Carl Eli. Terji misti tíðliga í báðum talvinum materiali, og tað revsar John Arni við harðastu viðferð. Seinna talvið millum teir er við í blaðnum. Eyðun fekk eisini góðan fong eftir smáar fimtan leikir í fyrra talvinum móti Carl Eli. Frúgv fyri rók og tríggjar finnur, og varð hetta nóg mikið til sigur. Seinna talvið kundi harafturímóti fara báðar vegir, men eisini her var Eyðun kaldari, og avgjørdi talvið tá báðir høvdu uml. 10 sek eftir á talvklokkuni. Ein gysari, og í roynd og veru rætti vinnari av hesari hálvfinalu.

Finalistarnir báðir hava vunnið øll síni talv í kappingini higartil. Fyrst teirra fýra talv í bólkaspølunum, og síðani bæði tvey í hálvfinaluni. Tískil er eingin ivi um, at røttu mennirnir eru í finaluni.

## Nr. 1 í 2. deild

Trý umfør eru leikt í donsku liðkappingini, og føroyska talvfelagið, sum leikar í næstbestu deildini, hevur fingið eina góða byrjan. Somikið góða, at liðið hevur tikið leiðsluna við hálvum stigi.

Í vikuskiftinum vunnu føroyingarnir (sum tó hava tveir danir á liðnum, sum telur átta telvarar) stórsigur á Odysseus. 5,5 - 2,5. Teir sum vunnu sunnudagin vóru IM Nicolaj Borge, John Arni Nilssen, Heini Olsen og Carl Eli N. Samuelsen. Eyðun Nolsøe, Heini Danielsen og Finn Nøhr leiktu javnt, meðan Terji Petersen tapti. Við IM Borge á liðnum er liðið alsamt styrkt, og av tí sama er uppflyting til bestu deildina sera realistiskt. Næsti dystur er ímóti Hillerød, og verður leiktur tann 12. januar.

**Støðan:**

| | |
|---|---|
| Talvf. Føroyar | 15 stig |
| Hillerød | 14,5 |
| Helsingør | 14,0 |
| Fredriksberg | 13,0 |
| Skakspilleren | 11,0 |
| Odysseus | 10,0 |
| AS 04 | 9,5 |
| Øbro | 9,0 |

# Talvið hesa vikuna

John Arni Nilssen — Terji Petersen
FM í útisetu, hálvfinala 09.12.2002

1.d4 d5 2.c4 e6 3.Rif3 Rif6 4.g3 c6 5.Fc2 Bd6 6.Bg2 0—0 7.0—0 Ribd7 8.b3 (John Arni dámar væl hesa uppstilling móti svarta byrjanarspælinum) 8...dxc4 9.bxc4 c5 10.e3 Rb8 11.Bb2 cxd4 12.exd4 Fc7 13.Ria3 a6 14.c5 Be7 15.Ric4 Rid5 (Terji er komin so nøkunlunda frá byrjanarspælinum. Stendur kanska nakað kroystur, men javnvágur er í støðuni) 16.Rac1 Rd8 [16...b6 er helst betri] 17.Fe2 Ri7f6 18.Rife5 Bd7 19.Rixd7 Fxd7 20.Rie5 Fc7 21.Ff3 b6 22.Ba3 b5 23.g4 g5?! (ivasamur leikur, 23...b4 24.Bb2 Rf8 vildi verið tryggari] 24.Rcd1 Rif4?



(Terji yvirsær her næsta leik hjá hvítum, sum gevur hvítum ein kvalitet og vinnandi støðu) 25.Ric6 Rixg2 26.Fxg2 Rid5 27.Rixb8 Rxb8 28.Bc1 (nú er bara spurningur um tíð nær John Arni vinnur. Ger skopuningurin ongan stórvegis feil er lætt vunnið. Terji ger tó eina roynd at berja seg aftur) 28...b4 29.Fg3 a5 30.Fxc7 Rixc7 31.Rd3 Rid5 32.Bd2 a4 33.Rb1 Kg7 34.Ra3 Bf6 35.Rxa4 Bxd4 36.c6 Rb6 37.c7 Rc6 38.Bxb4 Rxc7 39.Bd6 Rc6 40.Rxd4 Rxd6 41.a4 Ra6 42.Kf1 Kf6 43.Rc4 Ke5 44.Rb5 Kd6 45.a5 h6 46.Ke1 Ra7 47.Kd2 Ric7 48.Rb6+ Kd7 49.a6 1—0